# ÍTRÓTTARBLAÐIÐ

Sosialurin 4. desember 2009




# Spenningurin er hjá monnunum

**Menninir hjá Neistanum hava á pappírinum nógv tað sterkasta liðið í mansdeildini, men tætta kapprenningin ger, at eingin dystur er lættur. Og eingin ivi er um, at vestmenningar vilja gera sítt sunnudagin**

**Manskappingin er somikið tøtt í ár, at tað er vónleyst at peika á greiðar favorittar til nakran dyst**

Við einum KÍF-liði, sum av álvara er farið at bíta frá sær. Einum VÍF-liði, sum er í óvanligum trupulleikum, og sveiggjandi avrikum hjá Kyndli, H71, StÍF og partvíst eisini Neistanum er spenningurin stórur undan hvørjum tí einasta umfari av Atlantic Airways-kappingini í hondbólti.




Jákup Mørk

Hesa ferð skal Neistin á vitjan hjá VÍF, men hóast stigatalvan ger Neistan til greiðan favoritt, er eingin ivi um, at VÍF væl kann spæla við í uppgerðini.

Hvussu er og ikki, so er Neistin framvegis oddalið eftir vikuskiftið, men dysturin um at fylgja teimum í finalukósini er knallharður.

Tveir av biðlunum eru Kyndil og H71, sum hittas tí grannauppgerð longu leygardagin, og har eru lyfti um eina sera intensa uppgerð. Og tí kann eisini roknast við á Skála, har KÍF kemur á vitjan. Kollfirðingar vóru púrasta sørir fyrstu nógvu umføri, men seinastu ferðirnar hava teir bitið hart frá sær, og tí kann StÍF væl fáa trupulleikar.

## Parkapping

Hjá kvinnunum stendur kappingin í ár millum Stjørnuna og Tjaldur, og lítil ivi er um, at tey bæði eru stórfavorittar móti ávíkavist StÍF og VB.

Í Vestmanna er spenningurin á pappírinum kanska eitt vet størri, tá Neistin vitjar hjá VÍF.

Neistakvinnurnar tykjast longu nú at stevna móti einum tryggum bronsuplássi, har styrkin er væl størri enn hjá botninum, men samstundis hampuliga langt frá oddinum.

## Dystaryvirlit

### Hondbóltur

**Sunset-deildin**

| Dagur | Klokkan | Dystur |
|---|---|---|
| 05.12 | 17.00 | StÍF-Stjørnan |
| 06.12 | 14.30 | VÍF-Neistin |
| 06.12 | 15.00 | Tjaldur-VB |

**Atlantic Airways-kappingin**

| | | |
|---|---|---|
| 05.12 | 16.00 | Kyndil-H71 |
| 05.12 | 15.30 | StÍF-KÍF |
| 06.12 | 16.00 | VÍF-Neistin |

### Flogbóltur

**Eik-ligan, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 05.12 | 14.00 | Dráttur-Fleyr |
| 06.12 | 14.00 | SÍ-ÍF |
| 06.12 | 14.00 | TB-KÍF |

**Eik-ligan, menn**

| | | |
|---|---|---|
| 05.12 | 15.00 | SÍ-Fleyr |
| 06.12 | 14.00 | ÍF-Mjølnir |

# Fleyr vil upp í part

**Stóri flogbóltsdysturin hetta vikuskiftið verður í Sørvági, har Fleyr skal royna at fáa samband við oddin**

Fult flogbóltsumfar er aftur hetta vikuskiftið, og hjá monnunum verður mest spennandi uppgerðin helst í Sørvági.

Sørvingar hava verið sera stinnir størsta partin av kappingini, men teir eru aftan fyri Mjølnir í oddastríðnum, og samstundis hevur Fleyr fleiri ferðir trýst tey ovaru heilt nógv.

Megnar Fleyr at taka stikkið í Sørvági, leggja teir seg av álvara nær oddinum, meðan sørvingar hinvegin hava sítt at síggja til í kapprenningini móti Mjølni.

Júst Mjølnir skulu hetta vikuskiftið spæla móti unga ÍF-liðnum, sum kanska ikki hevur styrkina, sum liðið áður hevur havt, men sum kortini hevur víst, at teir væl og virðiliga kunnu bíta frá sær.

Hjá kvinnunum hevur eingin steðgað SÍ higartil, og tað er lítið, sum bendir á, at ÍF skal verða fyrsta liðið at gera hetta.

Mjølnir, sum er nummar tvey, heldur frí hetta vikuskiftið, og tað gevur Fleyr møguleika at vinna seg upp á silvurplássið, men tað verður avgjørt ikki lætt móti Drátti, sum her hevur sín møguleika at toga seg upp móti heiðursmerkjum.

Seinasti dysturin í kvinnudeildini verður í Trongisvági, har TB eisini hevur møguleika at nærkast heiðursmerkjum, um tær vina dystin móti KÍF, sum enn eigur síni fyrstu stig til góðar.

-mørk